# Fuglfirðingur brasilskur yrkis



**Í hesum døgum vitjar fuglfirðingurin Atli Ellendersen í Føroyum. Hann hevur búð í Brasiliu síðan 1989, har hann er professionellur violinspælari. Sosialurin hitti hann til eitt prát um tónleik, Brasilia, føroyska málið, útlegd og sjálvandi fótbólt og samba**

SUMMARGESTUR
*Orð/myndir:*
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

– At byrja sum 15 ára gamal at spæla violin er 10 ár ov seint. Men eg havi altíð verið ein droymari, sigur Atli Ellendersen við einum brosi, ið prógvar, at dreymar kunnu gerast til veruleika.

– 14 ára gamal vildi eg sleppa at læra at spæla klaver, men tað var eingin lærari burtur av í Fuglafirði um tað mundið, greiðir Atli frá. Sum ungur spældi hann althorn og trombon í Fuglafjarðar Hornorkestri. Hann minnist serliga onglendingin John Carr og landsmann hansara Owen Stanesby, ið leiddu hornorkestrið og undirvístu í bygdini um tað mundið. Serliga tann seinna minnist Atli sum eina sanna íblástrarkeldu, sum ikki bert lærdi hann at spæla klaver, men so sanniliga eisini eggjaði honum og hansara vinmonnum at elska og virðismeta alla list. Tónleik, málningalist og skaldskap.

Helst hevur tað verið hetta, ið eggjaði Atla at fara at spæla violin, og hann avgjørdi at læna eina frá Frits Johannesen.

Hóast Atli ongantíð hevur roynt seg sum rokktónleikara, so var dreymurin har, og hann minnist hvussu hann sum smádrongur plagdi at síggja upp til mammubeiggjan Stanley, tá hesin plagdi at spæla við Silly Boys. Men hann valdi tann klassiska vegin.

– Tað var ótrúligur munur her á bygd og í Havn. Eg sang í kóri og spældi í hornorkestri. Vit hoyrdu um Tórshavnar musikkskúla, sum var tað heilt stóra fyri okkum, sigur Atli.

### 20 minuttir avgjørdu lívið

Í 1977 flutti Atli til Danmarkar at ganga í skúla, og har fekk hann undirvísing í fiólspæli hjá Arna Svendsen úr tí tiltiknu Den Danske Kvartet.

– Tað er honum fyri at takka, at eg fór at spæla violin, greiðir Atli frá og leggur afturat, at hóast tað kann ljóða løgið, so føldi hann, at tað helst var fiólin, ið hann lættast fór at kunna liva av.

At byrja at spæla violin, tá ein fer í studentaskúla, er sum nevnt ikki heilt vanligt, men umstøðurnar á skúlanum vóru góðar, og Atli vandi fýra tímar hvørt kvøld. Tá skúlatingini vóru gjørd, fór hann at venja klokkan hálvgum átta og gavst ikki fyrr enn hálvgum tólv um kvøldið.

– Eg arbeiddi sum ein hestur ta tíðina, fortelur Atli.

Seinni flutti hann til Keypmannahavnar, har hann m.a. undirvísti, og í 1982 byrjaði hann á Musikvidenskabeligt Institut í sama býi, hóast hann ikki beinleiðis hevði ætlanir um lesa tónleikavísindi.

Á heysti sama ár fekk hann tó ein gyltan møguleika. Svendsen helt, at Atli átti at farið til Wien ella táverandi Leningrad at læra meira um fiólina, men júst tá varð meistaraklassi við undurbarninum Max Rostal boðir út í Sveis. Atli fór til upptøkuroynd og slapp gjøgnum nálareygað.

– Mítt lív bleiv avgjørt upp á hesar 20 minuttirnar, tá eg spældi fyri honum har, greiðir Atli frá. Rostal var tá 78 ára gamal og roknaður sum ein tann størsti tónleikanámsfrøðingurin í 20. øld.

– Tað tók mær eitt heilt ár at koma yvir hetta, tí øll 6 árini hugsaði eg, at Arne Svendsen sjálvur altíð hevði ynskt at sloppið at spælt hjá Rostal, men hevði ikki møguleika til tað. Tað var torført hjá einum fuglfirðingi, ið byrjaði at spæla violin sum 15 ára gamal at sodna hetta, sigur Atli um tíðina hjá Rostal.

### Orkestrið í kreppu

Árini 1983 til 1987 búði Atli sostatt í Bern í Sveis.

Í 1987-89 var Atli tó aftur í danska høvuðsstaðnum, har hann royndi seg í Danmarks Radios Symfoniorkester, DR's Underholdningsorkester, Sjællands Symfoniorkester, og Hälsingborgs Symfoniorkester í Svøríki.

Í Bern var tað tó runnið saman millum Atla og táverandi konu hansara. Hon var úr Brasilia, og var hetta helst ein av orsøkunum til, at lívsleiðin hjá Atla gekk tann vegin. Tað ikki ætlanin at flyta til hetta stóra landið í Suðuramerika, men tey vórðu boðin við í eitt kamarorkestur, sum í áttatiárunum varð roknað sum eitt tað frægasta og best lønta í Brasilia.

Tað gekk tó ikki heilt eftir vild, tí í 1990 varð nýggjur forseti valdur í Brasiliu, sum setti ymsar lógir úr gildi, ið góvu listafólkunum góðar sømdir. Atli sigur, at onkrar av hesum lógum helst blivu misnýttar. M.a. vórðu listafólk helst ofta biðin um at skriva undir, at tey høvdu móttikið eina millión frá ávísum fyritøkum, men fingu tó bert eina hálva. Fyritøkurnar kundu so draga hetta frá í skatti, greiðir Atli frá. Forsetaskiftið førdi sostatt við sær, at kamarorkestrið kom í kreppu, sum kortini samstundis førdi við sær, at hurðar vórðu latnar upp uttanlands, og Atli kom sum tónleikari til býir sum Salsburg, Prag, Breno og Saarbrücken og Karlsruhe, har hann m.a. tók tvær fløgur upp í einum tí flottasta upptøkuhølinum í Týsklandi tá, minnist Atli.

Kamarorkestrið varð upployst, av tí at teir flestu limirnar búðu ov langt frá hvørjum øðrum, og at flutnings- og hotellútreiðslurnar tí blivu ov høgar.

Atli varð tó seinni sáttmálasettur í einum øðrum kamarorkestri, sum hevði eitt kamarorkestur afturat